## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin, leygardagin og sunnudagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 17 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, týsdagin sum frálíður av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar og hitin millum 13 og 17 stig.

Sosialurin

# Dupult yvirháling førdi til trý ferðsluóhapp



**Eingin fólkaskaði hendi, tá trý ferðsluóhapp vóru í Kaldbaksbotni í morgun. Men við nógvu morgunferðsluni kundi óhappið við teimum fimm bilunum havt sera álvarsligar fylgjur**

FERÐSLA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fimm bilar fingu skaða, tá ein røð av hendingum førdi til trý ferðsluóhapp í Kaldbaksbotni. Fyrsta óhappið hendi, tá ein bilur á veg suðureftir fór út av vegnum beint eftir vegin til Kaldbaks. Hetta fekk fleiri bilar til at slaka ferðina, og uppi við tunnilsmunnan hevði hetta við sær at ein bilur rendi upp í afturpartin á einum øðrum bili. Ein triði bilur royndi at sleppa uttan um hesar báðar, men var sjálvur árendur av einum fjórða bili.



*Bilurin fór illa, men eingin fólkaskaði stóðst av hendingin, ið eisini førdi til ferðsluóhapp við tunnilsmunnan.* *myndir: Niels Uni*

Tað var ikki møguligt hjá okkum at fáa eina viðmerking frá bilføraranum í fremsta bilinum, men vitni siga, at hesin bilur royndi at yvirhála uttan um ein bil, ið var í ferð við at yvirhála nakrar aðrar. Undir yvirhálingini kom hann ov langt út í vegjaðaran út móti sjónum, og bilurin tók í autoverjuna og varð slongdur yvir um vegin og útav. Eftir at hava rent á bakkan varð hann slongdur upp aftur á vegin. Í tøttu morgunferðsluni má tað metast at vera eitt undur, at hesin bilur ikki rakti aðrar bilar, ella varð raktur av øðrum bilum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 15 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 13 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 15 |
| London | 21 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 20 |
| Keypmannah. | 21 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 22 |
| Warzawa | 23 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 22 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 33 |
| Malta | 26 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 23 |
| New York | 28 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 24 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1001 hPa. yvir Skotlandi fer suðureftir. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjanáttina.




**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Onglandi stendur mestsum í stað. Hátrýstið norðan fyri Azorurnar stendur í stað og ein hátrýstryggur vesturum Føroyar til Norska Havið verður væntandi yvir Føroyum um vikuskifti.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/8 kl. 06[00]– 17/8. 06[00]. Hitin í gjár: 10,9°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 5,1 mm – mált frá 16/8 kl. 06[00]– 17/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 33,1 mm


I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin

GEVIÐ BLÓÐ


## VESTFALLSKYRRINDI

10. august Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. Aug | 02.26 | 14.44 | 01.26 | 13.44 | 01.41 | 13.59 | 04.26 | 16.44 | 05.26 | 17.44 | 00.41 | 12.59 | 11.59 | - | 02.41 | 14.59 | 03.41 | 15.59 | 02.11 | 14.29 | 03.26 | 15.44 |
| 18. Aug | 03.11 | 15.38 | 02.11 | 14.38 | 02.26 | 14.53 | 05.11 | 17.38 | 06.11 | 18.38 | 01.26 | 13.53 | 00.26 | 12.53 | 03.26 | 15.53 | 04.26 | 16.53 | 02.56 | 15.23 | 04.11 | 16.38 |
| 19. Aug | 04.05 | 16.32 | 03.05 | 15.32 | 03.20 | 15.47 | 06.05 | 18.32 | 07.05 | 19.32 | 02.20 | 14.47 | 01.20 | 13.47 | 04.20 | 16.47 | 05.20 | 17.47 | 03.50 | 16.17 | 05.05 | 17.32 |
| 20. Aug | 04.58 | 17.24 | 03.58 | 16.24 | 04.13 | 16.39 | 06.58 | 19.24 | 07.58 | 20.24 | 03.13 | 15.39 | 02.13 | 14.39 | 05.13 | 17.39 | 06.13 | 18.39 | 04.43 | 17.09 | 05.58 | 18.24 |
| 21. Aug | 05.48 | 18.13 | 04.48 | 17.13 | 05.03 | 17.28 | 07.48 | 20.13 | 08.48 | 21.13 | 04.03 | 16.28 | 03.03 | 15.28 | 06.03 | 18.28 | 07.03 | 19.28 | 05.33 | 17.58 | 06.48 | 19.13 |

5 707265 100050 >